# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*HB spældi 3-3 javnleik móti VB/Sumba, men nú er vandi fyri, at havnarmenninir einki fáa fyri ómakin*

# VB/Sumba vil hava fleiri stig

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Leikari, sum hevur luttikið í landskappingini í eini deild, kann ikki luttaka í landskappingardysti í eini lægri deild, uttan at felag hansara í millumbilinum ella sama dag, hevur leikt landskappingardyst, sum hesin ikki luttók í, í hægru deildini, hóast viðkomandi leikari lógliga kundi luttaka.

Soleiðis verður skrivað í grein 8 í kappingarreglunum fyri fótbólt, og tað er fyri brot á hesar, at VB/Sumba hevur kært HB. Hendrik Rubeksen hjá HB skoraði tvær ferðir í dystinum, men hann spældi eisini við, tá Formula-liðið hjá HB seinasta týskvøld spældi í Gøtu móti Víkingi.

Spælarin var tó ikki við á liðnum hjá HB, sum sunnudagin spældi hálvfinalu í steypakappingini, og tað hevur helst gjørt sítt til, at HB nýtti spælaran í 1. deild. Í reglunum stendur tó, at spælarin skal sita yvir í landskappingardysti, um hann skal flyta niður í lægri deild at spæla. Og tað hevur Hendrik Rubeksen ikki gjørt.

VB/Sumba skrivar á heimasíðu sínari, at felagið hevur sent inn kæru til FSF um málið. Enn er ikki greitt, hvør niðurstøðan hjá FSF verður í málinum.

# Zenit tók steypið

**Russiska Zenit Petersborg vann í gjárkvøldið fyrsta europiska steypið í felagssøguni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um bæði spennandi og intensan dyst, sum í gjárkvøldið varð spældur á City of Manchester Stadium í Onglandi.

Leikliga vóru tað teir á russiska liðnum, sum vóru omaná, men sum vant stríddust skotarnir av øllum alvi fyri at halda lív í sínum vónum.

Og hetta sá eisini leingi út til at geva úrslit. Men eftir 72 minuttum brast fyri nev hjá Zenit, tá Igor Denisov varð spældur blankur, og so stóð 1-0 á talvuni.

Hetta noyddi Glasgow longur fram á vøllin, og tað opnaði eisini í verjupartinum. Og tað var eisini fult uppiborið, tá eitt sera vakurt Zenit-álop í yvirtíðini førdi til, at Konstatin Zurianov var púra blankur inni undir málinum, og soleiðis hálvgum kundi renna bóltin í meskarnar til endastøðuna.



*Igor Denisov hevur sent leðurkúluna í kassan, og so er Zenit ávegis fyrsta europiska steypinum í søguni hjá felagnum*
*Mynd: Polfoto/AP*

## Til Keypmannahavn at rennna Marathon

10 føroyingar verða millum tey 7.500, sum um vikuskiftið renna marathon í Keypmannahavn.

Talan er um rennarar úr Bragdinum og Føroya Triathlonfelag, og fara hesi av landinum fríggjadagin.

Tey 10, sum verða í føroyska ferðalagnum, eru Súni Jakobsen, Evald Rasmussen, Henry Olsen, Jógvan Olsen, Steindór Hjaltalin, Jón Johannsen, Andrias Hansen, Pauli Djurholm, Hákun Djurhuus og Andrass Joensen.

Nøkur av hesum hava tikið lut í líknandi kapping fyrr.

**-mørk**

## Hava ráð til Ronaldo

Real Madrid hevur leingi havt Cristiano Ronaldo ovast á sínum ynskilista, men eins leingi hevur Manchester United sagt, at spælarin ikki er til sølu.

Í spanska høvuðsstaðnum hava tey tó enn ikki givið upp, og nú ljóðar, at felagið er til reiðar við einum boði, sum er oman fyri milliardina.

- Vit hava fíggjarligu styrkina og gjaldførið til at keypa ein spælara sum Ronaldo. Ein slíkur handil í sjálvum sær vildi verið fíggjarliga forsvarligur, tí sølan av troyggjum og øðrum fíggjar hetta. Fáa vit ikki Ronaldo til Real Madrid, so er tað so ikki, tí vit ikki hava ráð til hann men av øðrum ávum, sigur stjórin í Real Madrid, Miguel Angel Arroyo, við enska soccernet. com.

**-mørk**